# Royndirnar gjørdu munin



*Christina Holm og tær hjá Kyndli byja›u dekan ov tí›liga at taka sær av løttum, og hetta mundi kosta› teimum sigurin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Ta› var um reppi›, at Sóljan tók stig frá Kyndli fríggjakvøldi›, men í avgerandi løtuni sveik sjálvsáliti› hjá uppflytarunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

**Kyndil-Sóljan 24-24 (14-10)**

Tá á lei› tríggir fjór›ingar av dystinum millum Kyndil og Sóljuna vóru leiktir fríggjakvøldi›, mundi ta› neyvan vera nakar á ásko›araplássunum, sum grun-a›i, at talan her fór at gerast um ein spennandi hondbóltsdyst.

Hóast munurin sum so ongantí› hev›i veri› hin heilt ógvusligi, so høvdu kyndilskvinnurnar alla tí›ina víst, hvønn vegin ta› bar, og so vi› og vi› høvdu tær vunnu sær eina trygga lei›slu.

Fer›in hev›i fram til tá ongantí› veri› hin heilt stóra, men ta› var greitt, at Kyndil var oman á. Tær høvdu tamarhald á stø›uni, tóku ta› róligt, og uttan at overva seg, hildu tær uppfluttu gestirnar í stuttum tjó›ri.

## Sálarliga spæli›

Hondbóltur er eitt spæl, har ein partur av spælinum er sálarligur, og hetta kom t‡›uliga til sjóndar seinasta partin av dystinum.

Tá tólv minuttir vóru eftir at leika, sendi Lotte Sørensen eitt av átta brotskøstum í neti›. Stø›an var tá 24-15 til heimali›i›, og alt tóktist leyst og li›ugt.

Høvdu kyndilskvinnurnar eisini hugsa› ta›, so høvdu tær forrokna› seg, tí enn vóru tær hjá Sóljuni als ikki lidnar.

Tær fingu átta mál á ra›, og fyri hvørt av hesum gjørdist fjálturin á kyndilsli›num alsamt størri. At byrja vi› tóktist hetta ikki at nerva, men sum Sóljan sansa›i meira og meira at, gjørdust tær alsamt grammari, samstundis sum kyndilsli›i› gjørdist alt meira rá›aleyst.

Kyndil framdi nú hópin av mistøkum á álopinum, og umframt vanligu álopini, fekk Sóljan tískil eisini høvi til skjót mótálop. Vanligu álopini fóru aloftast solei›is fram, at roynt var› at fáa tríggja metra kas, og so var› stilla› upp, so litaviski stórskjúttin kundi royna seg.

Hesi átta málin syrgdu sostatt fyri, at munurin brádliga bert var eitt mál, men í næst seinasta minuttinum slapp Kyndil aftur at draga andan lættari. Brotskast var› dømt, og hetta setti Lotte Sørensen trygt í neti›.

## Nervarnir sviku

Enn var dysturin ikki avgjørdur. Í næsta álopinum minka›i Sóljan aftur ni›ur í eitt mál, og enn var ein minuttur eftir at spæla.

Sálarliga tyngdu kyndilskvinnurnar kundu havt valt at drála, men ísta›in valdu tær at avslutta skjótt. Málverjin hjá Sóljuni bjarga›i, og so kundi Sóljan aftur fara í álop. Alt strí›i› tóktist vera til fán‡tis, tá tær í hesum mistu bóltin av sí›ulinjuni, men Kyndil gav teimum enn ein møguleika.

Í eini seinastu roynd at fáa anna› stigi›, fóru sóljurnar langt út á vøllin at verja, og ta› eydna›ist eisini at órógva kyndilsli›i›. Bólturin var› mistur út, og vi› eini langari sending var› Hertha Simonsen send einsamøll avsta›. Ivaleyst kendi hon tr‡sti› á sær, tí me›an hon í einum trimum líknandi stø›um hev›i skora› trygt, so kiksa›i alt hesafer›. Málverjin hjá Kyndli vardi fyri skotinum, umframt at Hertha tra›ka›i inn um mark, so máli› hev›i ikki talt undir nøkrum umstø›um.

Í døpurhuga máttu tær hjá Sóljuni solei›is fyri a›ru fer› í ár ásanna, at tær høvdu veri› eitt mál ov stuttar í Havnini, og eisini tá tóktust væntandi roynd-irnar at vera størsta einsamalla orsøkin til tepra tapi› fyri Neistanum.



*Sólja og Sóljan noyddust fyri a›ru fer› í ár fara úr Havnini vi› teprum tapi*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Meira enn Simona

Vi› læntum málbur›i úr golfheiminum, so spældi kyndilsli›i› undir par. Tær høvdu sum so heldur ikki fyri ney›ini at vinda seg upp, tí meginpartin av dystinum tóktust tær at hava tamarhald á. Fram móti endanum var tó um reppi›, at alt datt á gólvi›, og tær munnu vera takksamar um, at tær hóast alt fingu tvey stig burtur úr.

Hjá Sóljuni var ta› sum ikki einafer› Simona Dzikgye, sum gjørdi mest um seg. Toppskjúttin í deildini var tó ikki heilt so einsamøll hesa fer›, og serliga var ta› kvika Hertha Simonsen, gjørdi um seg. Skal nøkur onnur takast fram um, má ta› ver›a málverjin, Mristina Griksaite, sum seinnu helvt av seinna hálvleiki so at siga læsti máli›. Annars eigur restin av li›num eisini uppibori› rós fyri strí›sviljan. Ver›ur hesin eins stórur komandi dystirnar, kunnu tær væl kløkka okkurt av ovaru li›unum, um tær ikki taka setningin í nóg stórum álvara.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Kyndil: Lotte Sørensen 9(8), Ann Hansen 4, Jórun Ludvig 3, Anita Kjærbo 3, Signhild Petersen 2, Kristina Holm 2, Brynhild Klein 2
Sóljan: Simona Dzikgyte 12(2), Hertha Simonsen 5, Jóhanna i Horni 2, Heidi M. Akslelsen 2, Elspa Egilstoft 1, Marjun Jørgensen 1, Sólja Nielsen 1
Brotskøst: Kyndil 9, Sóljan 2
Útvísingar: Kyndil 1, Sóljan 2
Dómarar úr H71/Neistanum: Kristian Martin Skála og Hjalmar Johansen. Komu væl frá uppgávuni, sum ikki var serliga torfør, tí fer›in var somiki› lág



# Tjaldur kann bíta frá sær

**Heldur ikki í fimta landskappingardystin um eydna›ist ta› tjaldursmonnum at fáa stig, men avriki› hesafer› var tó positivt í nógvar mátar**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

**Neistin-Tjaldur 25-15 (10-7)**



*N‡ggi málverjin tykist vera Tjaldrinum ein stórur styrkur. Her er ta› Ári Rouch, sum til fán‡tis roynir seg av vonginum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Ta› var ikki sørt av spenningi millum ásko›ararnar, tá dysturin millum Neistan og Tjaldur var› bríksla›ur ígongd leygardagin.

Orsøkin til spenningin var eisini ey›s‡nd, tí millum tjaldursleikararnar vóru tvey andlit, sum ikki høvdu veri› frammi í føroyskum hondbóltshøpi á›ur. Talan var um málverjan, Jotic Zelko og útileikaran, Zoran Savicevic, sum júast vóru komnir til landi›.

## Orkan gekk undan

Beinanvegin tóktist eisini greitt, at styrkurin vi› útlendsku leikarunum gjørdi mun hjá Tjaldrinum.

Serliga málverjin tóktist at vera væl fyri, og hann framdi beinan vegin fleiri gó›ar bjargingar. Útileikarin byrja›i á beinkinum, men tá hann kom inn, sást eisini skjótt, at hondbóltsevnini eru gó›.

Umframt hesar, hevur Tjaldur nú eisini Jens Martin Knudsen vi› í hópinum, og fyrstu gó›u løtuna sá eisini út til, at talan kundi gerast um sera avnan dyst.

Jens Martin s‡ndi fleiri fintur, sum neistaverjan neyvan hevur sæ› á›ur, Sverri fekk so vi› og vi› stilla kanónina inn, Zoran royndi seg vi› fríspælingum, me›an Zelko í fleiri førum s‡ndi kynstur síni.

Alt hetta var eisini vi› til at lyfta restina av tjaldursli›num, men so vi› og vi› tóktist tó greitt, at orkan ikki var nóg gó›.

Sostatt fekk Neistin toga› naka› frá, beint fyri hálvleik, og í seinna hálvleiki helt hendan gongdin fram. Sum frá lei› hvarv allur spenningur úr dystinum, men tá saman um kom, so hev›i Tjaldur tó s‡nt, at li›i› eigur at takast í álvara. Fyrsta treytin er tó, at venjingarstø›an ver›ur betri.

## Ver›ur helst betri

Sum nevnt, so tykist serliga málverjin at gerast ein sannur fongur hjá Tjaldrinum. Leygardagin framdi hann eina rø› av gó›um bjargingum, og millum anna› lá væl fyri at lokka spælararnar at skjóta, júst har hann vildi. Dagsins detalju mundi hann eisini eiga, tá hann móti endanum av dystinum hev›i tríggjar bjargingar á ra›, tá fleiri neistamenn gjørdust púra leysir í einum mótálopi›. Avrikini ver›a helst eisini betri, tá hann hevur vant seg vi› verjuna og øvugt.

Útileikarin, Zoran, tykist hava sera gott eyga fyri spælinum, men enn restar nógv í, á›renn hetta kemur til sín rætt. Hesa fer› sást hann í fleiri førum tveita bóltin í tómrúm, men truppulleikin var tó, at eingin av vi›leikarunum fylgdi vi› í framkomnu tonkum hansara.

Harumframt hevur álopsparturin fingi› eina n‡ggja dimensión vi› Jens Martini Knudsen, og er lagi› á honum hitt rætta, kann hann seta grá hár í heysin á flestu verjuleikarunum, so alt í alt tykist Tjaldur at vera á rættari lei›.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
Neistin: Ragnar Joensen 6, Ári Rouch 5, Kári Mortensen 4(3), Jacob Jónsson 2(1), Jákup Sverri Kass 2, Helgi Justinussen 2, Áki Mørk 2, Lars Winther 1, Ræni Slættanes 1
Tjaldur: Jens Martin Knudsen 6(3), Sverri Justinussen 5, Svein í Hei›unum 2, Arnfinn Langgaard 1, Zoran Savicevic 1
Brotskøst: Neistin 5, Tjaldur 4
Útvísingar: Neistin 3, Tjaldur 3
Dómarar úr H71: Kristian Martin Skála og Petur S. Dahl. Eftir dømingina í kvinnudystinum beint á›renn, kundi ein veri› bangin um, at ta› kundi ganga heilt gali›, men tíbetur var dysturin sera róligur í so máta.

# VB fer eftir meistaraheitinum

**Kvinnurnar hjá VB vunnu ein tryggan sigur á Sóljuni í Vági sunnudagin. Úrsliti› var 32-21, og vágskvinnur dylja ikki fyri, at teirra mál í ár er einki minni enn gulli›**

HONDBÓLTUR
*Stefan í Skorini*

**VB-Sóljan 32-21 (13-11)**



*Guri› Mortensen sigur, at VB í ár ætlar sær fram í oddin, og úrslitini higartil hava heldur ikki veri› av eini lei›*

*Mynd: Áki Bertholdsen*

Ta› leika›i hampuliga javnt á í fyrra hálvleiki millum VB og Sóljuna, men tó var heimali›i› frammanfyri allatí›ina vi› fáum málum.

Eftir ste›gin lat VB ongan iva ver›a um, hvønn veg dysturin fór at koppa. Munurin var tvey mál vi› ste›gin, men á›renn Sóljan fekk tí› at venda sær á eftir ste›gin, hev›i VB skoti› fimm mál, uttan at Sóljan hev›i fingi› nakran bólt í máli›.

Tann føroyingurin, sum skeyt flest mál hjá VB, var Guri› Mortensen, og hon helt ongantí› nakran iva ver›a um, at VB var betra li›i›.

- Ta› var tætt í fyrra hálvleiki, men eftir ste›gin mansvardu vit Simonu Dziugyte, og tá hev›i álopi› hjá Sóljuni líti› at bjó›a uppá.

- Máli› hjá okkum er uttan iva at vinna meistaraheiti›, tí vit eru førar fyri tí. Í fyrsta dystinum móti Sjørnuni vóru vit ikki í nóg gó›ari venjing, men hon skuldi veri› í lagi nú. Hópurin er nógv brei›ari í ár enn í fjør, tí fleiri eru farnar aftur at venja hon0dbólt, sigur Guri› Mortensen.

Venjari hjá Sóljuni er Albert Ellefsen, og hann metir, at Sóljan avgjørt hevur eina framtí› í bestu kvinnudeildini.

- Ta› var javnt í fyrra hálvleiki, men ta› var sera torført at spæla, tá Simona var› mansvard og ikki kundi ver›a vi› í álopsspælinum.

- Vit eru annars ikki verri fyri enn hini li›ini, men ta› eru ofta royndirnar, sum vanta hjá okkum. Li›i› er sera ungt, og tær flestu eru omanfyri tey tjúgu árini, sigur Albert Ellefsen.

Sóljan hevur annars veri› nær vi› at fáa stig móti bæ›i Neistanum og Kyndli, men bá›ir dystirnir eru enda›ir vi› eitt máls sigrum til havnarkvinnur.

Annars metir Albert Ellefsen, at strí›i› um meistaraheiti› fer at standa millum Stjørnuna, VÍF og VB, tí tey li›ini hava víst nógv betri spæl enn restin.

### Dysturin í tølum

**Málskjúttar:**
VB: Andrea Lütz 8, Regina Radó 8(3), Guri› Mortensen 6, Maria Winther 3(2), Rannvá Augustinussen 2, Margreth Augustinussen 2, Sólrun Krosslá 2, Ey›britt Krosslá 1
Sóljan: Simona Dzikgyte 9(2), Marjun Jørgensen 6(1), Hertha Simonsen 2, Heidi M. Akselsen 2, Joan Haraldsen 1, Sólja Nielsen 1
Brotskøst: VB 8, Sóljan 5
Útvísingar: VB 1, Sóljan 1
Dómarar úr H71: Kristian Martin Skála og Petur S. Dahl